Álit

í

løgtingsmáli nr. 93/2022: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um loyvisgjald á alivinnu (Broytingar í tøkugjaldinum)

Høgni Hoydal, landsstýrismaður í uttanríkis- og vinnumálum, hevur lagt málið fram tann 28. mars 2023 og eftir 1. viðgerð tann 31. mars 2023 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 19., 21. og 26. apríl og 4. mai 2023.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri Búskaparráðið, Havbúnaðarfelagið Kommunufelagið og landsstýrismannin í uttanríkis- og vinnumálum, Høgna Hoydal.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í tríggjar minnilutar.

Ein minniluti (Annika Olsen, Uni Holm Johannesen og Karlot Hergeirsson) hevur hesar viðmerkingar:
Í samgonguskjalinum hava samgonguflokkarnir, Javnaðarflokkurin, Tjóðveldi og Framsókn, avrátt, at ein munandi, men rímiligur partur av serstaka vinninginum – tilfeingisrentuni – sum vinnulig serrættandi kunnu hava við sær, fellur til landið. Endamálið er fyrst og fremst at tryggja búskapin, lækka lønarskattin og javnseta kappingartreytirnar hjá allari vinnuni.

Í samgonguskjalinum stendur eisini, at kommunurnar skulu fáa lut í tøkugjaldinum, sum alivinnan rindar fyri brúksrættin til firðirnar, og útgangsstøðið er, at tøkugjaldið skal setast við atliti at inntøku og framleiðslukostnaði hjá vinnuni.
Hetta uppskotið um tillagað tøkugjald tekur støði í hesum viðurskiftum. Alivinnan skal rinda fyri rættindini at brúka føroysku firðingar, og hon eigur at rinda meira, tá ið tað gongur serliga væl í vinnuni.

Alivinnan er ein av høvuðsmotorunum í føroyska samfelagsbúskapinum. Stóra fyritaksemið í vinnuni skapar stór virði fyri føroyska samfelagið, og avleidda virksemið er eisini virðismikið kring alt landið. Fyritøkurnar og starvsfólkini har framleiða eina vøru, sum tað er stórur eftirspurningur eftir, og sum kundar vilja rinda nógvar pengar fyri. Í fjør útflutti alivinnan fyri 4,4 mia. kr, svarandi til 44,6 prosent av samlaða føroyska vøruútflutninginum.

Hesin minnilutin heldur tað vera rætt, at alivinnan rindar fyri rættin at gagnnýta føroysku alifirðirnar. Og hesin minnilutin heldur tað eisini vera rímiligt, at alifyritøkurnar rinda meira, tá laksaprísurin er serliga góður. Minnilutin heldur tað vera rætt og rímiligt, at ein størri partur av serliga vinninginum í teimum vinnum, sum hava vinnuliga atgongd til okkara avmarkaðu nátturukeldur, kemur samfelagnum til góðar. Tøkugjaldið skal í størri mun vera við til at fíggja føroyska vælferðarsamfelagið, og ætlanin er eisini, at tøkugjaldið skal vera grundarlagið undir skattalætta til lág- og miðallønt, sum verður lagt fyri Løgtingið í heyst. Tað er eisini «social responsibility», sum føroyska alivinnan leggur dent á í sínari marknaðarstrategi.

Bygnaðurin í uppskotinum
Uppskotið byggir á meginreglurnar í verandi skipan. Grundgjaldið er 0,5 prosent, og annars hækkar gjaldið, tá prísurin á laksi á altjóða marknaðinum hækkar. Útrokningargrundarlagið er mánaðarligi miðalspotprísurin í evrum fyri kruvdan laks á Fish Pool Index.

Framleiðslukostnaðurin verður nú grundarlagið undir skipanini, sum verður roknaður hálvárliga. Skipanin tillagar eisini seg sjálva, so hvørt sum framleiðslukostnaðurin hækkar. Tað vil siga, at tá framleiðslukostnaðurin fer upp, flytur stigin seg eisini samsvarandi. Upprunaliga var ætlanin, at framleiðslukostnaðurin skuldi gerast upp árliga, men Havbúnaðarfelagið hevur víst á týdningin av at hava so dagførd tøl sum tilber, tí framleiðslukostnaðurin kann vaksa skjótt. Hetta er tikið til eftirtektar.

Fyrimunirnir við hesari skipanini eru, at hon er sum heild løtt at umskipa, samstundis sum skipanin leggur upp til, at tað vinnuliga loysir seg at effektivisera og fáa so nógv burtur úr hvørjum kilo sum tilber.

Inntøkur landskassans
Tillagingarnar í tøkugjaldinum verða framdar skynsamt, so alivinnan framhaldandi verður ein høvuðssúla undir búskapinum, og kann gera munadyggar íløgur og vera virðisskapandi. Progressiva skipanin ger, at tað verður gongdin í vinnuni, sum avger, hvat vinnan rindar í tøkugjaldi. Tað verður mett, at við verandi skipan, sum er í gildi nú, høvdu alifyritøkurnar rindað 276 mió. kr. í tøkugjaldi í ár. Hevði hetta uppskotið verið í gildi alt árið, hevði upphæddin verið 489 mió. kr.
Annað hugsað dømi er, at skal vinnan við hesum uppskotinum rinda okkurt um 570 mió. kr. í loyvisgjaldi, hevði úrslitið í vinnuni samstundis verið væl oman fyri 2 mia. kr. Tað vil siga, at tað verða framvegis góðir møguleikar at gera íløgur, sum eisini er neyðugt fyri framhaldandi at fáa sum mest burturúr.

Kommunurnar fáa part av tøkugjaldinum
Kommunurnar standa við hesum uppskotinum til at missa 38 mió. kr. í alt í partafelagsskatti. Kommunurnar fáa 30 prosent av partafelagsskattinum, og broytingarnar í tøkugjaldinum fara at hava við sær, at alifyritøkurnar rinda minni í partafelagsskatti, enn tær annars høvdu skulað.
Í samráð við Kommunufelagið er avgerð tikin um, at 2 prosent av tøkugjaldinum verða latin kommununum. Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum fer í kunngerð at áseta nærri reglur um, hvussu pengarnir skulu býtast millum kommunurnar.

Ein partur til gransking
Vitan er avgerandi fyritreyt fyri varandi aling. Vit vilja, at alivinnuni eisini verður lív lagað í framtíðini, og vit vilja, at alivinnan mennist burðardygt. Vit eiga tí støðugt at granska í teimum lívfrøðiligu viðurskiftunum á føroysku firðunum, so nýggj vitan og tøkni verða ment fyri at slóða fyri nýggjum og burðardyggum leiðum fyri føroyska aling.
Landið eigur at stuðla og skapa karmar fyri nýggjum burðardyggum háttum at ala, eisini á landi og opnum havi. Ein liður í hesum er, at 1 prosent av tøkugjaldinum fer til gransking innan aling, so nakað kemur aftur til alivinnuna. Tað kann vera granskingarpengar til nýmenning og burðardygd, ella hvussu bilbugt kann fáast við laksalúsini.

Meirvirkaðar vørur
Partar av alivinnuni halda, at ein serlig skattaskipan eigur at vera fyri meirvirkaðar vørur. Hesin minnilutin hevur umrøtt hesi viðurskiftini, og tað verður ikki mett skynsamt at hava serligar skattaskipanir fyri ávísar partar av vinnuni.
Tøkugjaldið er fyri atgongdina at ala á føroysku firðunum, og tað eigur sum útgangsstøði ikki at taka hædd fyri, hvat alifyritøkurnar velja at gera við rávøruna, tá hon verður tikin upp úr føroysku firðunum. Vanliga víðarivirkar vinnan, tí tað loysir seg rakstrarbúskaparliga, og ein serlig skipan fyri meirvirking er at rokna sum ein stuðulsskipan til framleiðslu.

Búskapargrunnurin
Sum ávíst, so skal ein partur av væntaðu meirinntøkunum fíggja ein skattalætta til láglønt og miðallønt og bøta um vælferðartænasturnar í Føroyum. Tað er ein góð og avgerandi íløga í fólk og samfelag. Hesin minnilutin heldur tað kortini eisini vera umráðandi, at ein partur av meirinntøkunum fer í búskapargrunnin, sum so verður javnaður út við føstum leisti yvir nøkur ár, so búskaparlig hædd verður tikin fyri, at príslegan á marknaðinum kann broytast, og at inntøkurnar hjá landinum kunnu lækka einstøk ár.

Við hesum viðmerkingum tekur hesin minnilutin undir við uppskotinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Ein annar minniluti (Erhard Joensen og Eyðdis Hartmann Niclasen) hevur hesar viðmerkingar:

Tinglimir fyri Sambandsflokkin hava lagt eitt tilsvarandi uppskot fram í løgtingsmáli nr. 73/2022: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um loyvisgjald á alivinnu (Broytingar í tøkugjaldinum)

Munurin á uppskotunum er í høvuðsheitum sjálvur stigin, sum tøkugjøldini verða útroknað eftir. Útrokningin av framleiðslukostnaðinum er júst hin sama í báðum uppskotunum.
Tað eru 9 trin í uppskotinum frá landsstýrinum, meðan tað eru 5 trin í uppskotinum frá Sambandsflokkinum.
Hyggja vit eftir avleiðingunum av báðum uppskotunum, gevur uppskotið frá landsstýrinum eina fýra falding av mest kravda skattinum, tá marknaðarprísurin er 40 kr./kg hægri enn framleiðslukostnaðurin, meðan uppskotið frá Sambandsflokkinum gevur eina tvífalding av mest kravda skattinum.
Ein roynd varð gjørd at finna eina semju, ið var ein millumloysn ímillum uppskotini, men ongin áhugi var frá samgonguni fyri eini semju. Tinglimir fyri Sambandsflokkin vildu strekkja seg langt fyri at fáa eina semju.
Sitandi samgonga sigur í sínum viðmerkingum í áliti til broytingarnar um loyvisgjald í 2018, løgtingsmál nr. 42/2018, soleiðis: “tað liggur ein ábyrgd á øllum pørtum í politisku skipanini at finna breiðar semjur um slík viðurskifti, so vinnan veit, hvat hon hevur at fyrihalda seg til.”
Hesin minnilutin skilir tí ikki, hví ein semja ikki kundi finnast, havandi í huga, at júst somu flokkar, sum í dag sita í samgongu, ásettu í 2018 galdandi tøkugjaldið, har mett var rímiligt at hækka mest kravda skatt úr 4,5% upp í 5%.
At sama samgonga nú 5 ár seinni heldur tað verða avgerandi at fýra falda mest loyvda skattin er tí púra óskiljandi fyri minnilutan. Ein fýra falding er eitt óvanligt stig at taka, tá tað snýr seg um skatting av eini vinnu.

Vinnan er sera íløgutung, og rúm tíð er frá, at íløgan verður gjørd, inntil úrslitið slær ígjøgnum. Hendan fortreytin er sera umráðandi at hava í huga, tá vinnan verður skattað á hendan hátt, og hetta er uttan iva nakað, sum vinnan hevur við í viðgerðini, tá framtíðar íløgur verða viðgjørdar.

Harumframt fer ein rímiliga stórur partur av framleiðsluni í Føroyum til sokallaða VAP framleiðslu (value added products). Hesin minnilutin heldur, at tað er ongin ivi um, at við so høgum tøkugjaldi, sum her er talan um, fer tað at hava ávirkan á, um man velur at gera kontraktir upp á VAP í framtíðini. Hetta metir minnilutin vera sera óheppið, tí hendan framleiðslan er í fyrsta lagi at meta sum ein prístrygging hjá feløgunum av einum parti av framleiðsluni, og í øðrum lagi gevur hetta eitt stórt búskaparligt íkast fyri feløg, land og kommunur.

Við uppskotinum hjá landsstýrinum, fer samlaða skattatrýstið, t.v.s. partafelagsskattur, tøkugjald og skattur av vinningsbýti at verða umleið 60%, umframt allar tær skattainntøkur sum stava frá tí sera høga íløguvirkseminum, sum vinnan kastar av sær kring alt landið. Sanniliga ein høna, ið verpur gullegg; serliga fyri landið.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Ein triði minniluti (Árni Skaale og Jørgen Niclasen) ásannar, at neyðugt er at dagføra lógina um loyvisgjald á alivinnuna.
Rúm tíð er gingin, síðan lógin varð samtykt, og hon hevur ikki fylgt við tíðini. Til dømis verður í verandi lóg álagdur toppskattur, hóast alivinnan skuldi havt tap av framleiðsluni.
Men av tí, at tíðirnar hjá alivinnuni hava verið góðar, og at toppskatturin “einans” er 5%, so hevur alivinnan havt mót uppá at gjørt ovurstórar íløgur. Alivinnan hevur brúkt alt sítt yvirskot til íløgur, og okkurt felag hevur brúkt meira til íløgur, enn tey hava tjent. Hetta í vón um framtíðarvinning.
Men nú hann skal koma, velur landsstýrið at 4 falda toppskatttin.
Sum dømi kann nevnast, at norska alivinnan í miðal hevur brúkt 4 kr./kg til íløgur, meðan tann føroyska hevur brúkt 12 kr./kg.

Stórar íløgur eru gjørdar í at fleirfalda vektina á smolti, áðrenn tað fer á sjógv. Stórar íløgur eru eisini gjørdar í sjúkuviðgerð og fyribyrgjan við skipum og nú eisini lokaðum ringum. Hetta hevur gjørt kostnaðin at ala munandi dýrari, men hevur ført okkara alivinnu til at vera tann fremsta í heiminum. At vera fremst sæst altíð aftur á botnlinjuni áðrenn skatt.

Við verandi uppskoti fáa vit tíverri eisini heimsmet í skatti á alivinnu. Tá eru sannlíkindi stór fyri, at vit missa fyrsta plássið sum aliland. Slík heimsmet ganga sjáldan hond í hond.
Eitt er, at landsstýrið ætlar at 4 falda toppskattin, men harafturat er skipanin soleiðis, at alifyritøka kann hava lønandi aling, men tað blívur undirskot av skattinum.
Allir firðir eru í brúk, so skal alivinnan framhaldandi mennast og vaksa, er neyðugt við stórum íløgum. Hvørt kilo, ið skal framleiðast afturat, kostar munandi meira enn meðalkostaðurin. Tá meðalkostnaðurin er grundarlag fyri skattinum, er skjótt, at slík íløga fer at geva undirskot, bara av skattinum. Tí verður slík íløga ikki gjørd.

Alivinnan hevur í nógv ár arbeitt við at víðarivirka laksin í Føroyum. Her hevur talan verið um m.a. fløk og portiónir. Har er neyðugt at gera langtíðaravtalur. Við teimum kann vinnast, um prísurin á marknaðinum lækkar, men eisini kann tapast, tá prísurin fer upp. Uppskotið brúkar heimsprísin mánað fyri mánað at skatta eftir. Tað merkir, at skatturin áleggur ein eyka vága á víðariframleiðslu í

Føroyum. Við langtíðaravtalum er ein vági við at prísurin hækkar, og nú vil landsstýrið leggja ein eykaskatt, tá júst tað hendir. Vágin við víðari framleiðslu verður tí tvífaldaður og kann føra til, at hugurin til slíka framleiðsu og virðisøking minkar ella blívur burtur.

Hesin minnilutin er undir viðgerðini blivin sannførdur um, at hægri partafelagsskattur er munandi betri enn ein skipan við tøkugjaldi. Slíka skipan fer Norra at seta í gildi, tó bara fyri virðisøkingina á sjónum. Harafturat ætlar Norra at geva stuðul til íløgur í alivinnuna. Í mun til ætlaða skattin hjá samgonguni vil ein partafelagsskattur altíð tryggja, at vinnulig íløga, sum lønar seg, ongantíð verður skattað til undirskot. Tí vil ein eyka partafelagskattur stimbra til íløgur, meðan fyriliggjandi uppskot vil køva íløguhugin.
Í skattalóg okkara um útvinning av olju er ein stigvíst hækkandi partafelagsskattur, alt eftir vinningi. Tann lógin tryggjar, at øll íløgan er goldin, áðrenn stigvísið skatturin hækkar. Slík skipan tryggjar inntøkur til landskassan, men er samstundis við til at stimbra íløguhugin.

Hesin minnilutin mælir tí landstýrinum til at gera eina skattaskipan fyri alivinnuna, sum er ein eyka partafelagsskattur, helst við straksavskriving av íløgum, heldur enn verandi skipan.

Við hesum viðmerkingum tekur hesin minnilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Vinnunevndin, 12. mai 2023

Erhard Joensen formaður	Annika Olsen næstformaður	Uni Holm Johannesen
Karlot Hergeirsson	Árni Skaale	Jørgen Niclasen

Eyðdis Hartmann Niclasen